

Kvitbjørn.

# Gassrikið góðsskip undir føroyskum flaggi doypt í dag

**Jógvan Hugo Gardar**

16.04.2015 - 17:55

Oljan.fo

Í dag hevur dópur verið í Stavanger, har nýggjasta góðsskipið hjá Nor Lines hevur fingið navn. Skipið skal eita Kvitbjørn.

Kvitbjørn er undir føroyskum flaggi, og tað er Shipping.fo sum er manningardeild hjá Skipafelagnum Norlines, eins og Shipping.fo eisini er flaggstatsagentur hjá reiðarínum.

Yvirmennirnir á Kvitbjørn eru føroyingar, og til samans eru átta føroyingar við skipinum.

Systirskipið hjá Kvitbjørn, Kvitnos, er í gerð í Kina og verður væntandi klárt í juni í ár. Kvitnos skal eisini undir føroyskt flagg.

- Ta vit velja at gera so stórar íløgur í gassrikin skip, so er tað tí at vit meta at hetta er framtíðin og at hetta kemur at løna seg við tíðini. Vit hava sum mál at vera í oddinum tá talan er um nýhugsan innan góðsflutning og serliga at menna grønan flutning, sigur stjórin í Norlines, Tor Arne Borge í samrøðu við Sysla.